# Talv tekur seg nógv fram





**Vit prenta her røðu, sum Karin Kjølbro helt í sambandi við, at seinasta barna- og ungdómskappingin í talvi varð hildin í Norðurlandahúsinum 15. april 2002**

Góðu børn – kæri ungdómur.

Vegna Norðurlandahúsið skal eg bjóða tykkum at vera vælkomin.

Vit eru serliga glað fyri vitjan tykkara. Norðurlandahúsið hevur beinleiðis álagt húsum sum hesum serliga at lata dyrnar upp fyri børnum og ungum. Nú hava tit fleiri ferðir verið her, og vit halda, at eisini tit hoyra til og eiga hetta valahús.

Tað var eitt skilahugskot, tá talvfeløgini kring landið tóku stig til at seta ung og børn við. Her grør um gangandi fót. Í nøkrum av skúlunum eru lærarar eldsálir, ið vilja læra børnini, og harumframt er talv vorðið møgulig lærugrein í kvøldskúlaundirvísingini.

Vit eru mong ið halda, at so stór ogn er í talvspæli, at tað átti at veri lærugrein í fólkaskúlanum. Varð tað so, so komu genturnar helst eisini at taka hetta spæl til sín.

Fari at nýta høvi at takka tykkum íbirtarum, ið geva okkara børnum og ungum eina breyt at ganga, ið bæði kann vera alternativ og ískoyti til ítróttin, teldur og alnót.

Hetta er dømi um týdningarmikið fyribyrgjandi arbeiði, tá tað er best.

Tú gerst málleys, tá tú fert at kunna teg um hetta ediliga spæl. Skilji, at tað longu eru milliónа møguleikar at flyta talvfólki, eftir fáar leikir á borðinum.

Eisini víkingar telvaðu. Vit kunnu siga, at tit eru við til at byggja brúgv frá fornøld okkara til KT-øldina. Grannatjóð okkara Ísland, sendi sjey teirra bestu telvarar til Keypmannahavnar í 1994 fyri at hátíðarhalda 50 ára dagin fyri frælsi sínum. Ætlanin var at telva simultant móti í alt 640 dønum, sum svarar til tíðarskeiðið uppá 640 ár, sum ísland og Danmark vóru saman í ríkisfelagsskapi.

Ikki skulu tit ivast í, at mong okkara vóru pretin (errin), tá Hans Kristian Simonsen vann á Garry Kasparov. Eisni her er dømi um, at tit ungu seta Føroyar á heimskortið, eins og t.d. svimjihetjan Heidi Andreassen gjørdi tað. Í farnu viku gjørdist eitt fimleikaralið í Føroyum danmarkarmeistarar.

Vænti, at onkur serlig barna- og ungdómskapping verður næsta ár, tá danska talvsambandið verður 100 ár. Stuttligt hevði verið, um tit tá kundu gjørst Danmarkarmeistarar. Gott er at seta sær høg mál, men gloymi ikki, at hitt týdningarmesta er at vera við og at hava gleði av tí vinarlagi og samanhaldi, sum fylgir við.

Dagurin í dag er endin á kappingum tykkara á hesum sinni. Ljósið og summarið býður eisini tykkum eina góða kapping í dag og eitt gott summar fyri framman.

Við hesum orðum er barna- og ungdómskappingin 2002 í Norðurlandahúsinum sett.











# Skeggjar fekk flest heiðursmerki

**Smáungalingameistarakappingin var í Vági seinasta vikuskiftið, og svimjifelagið Skeggjar úr Gøtu vann kappingina við heili 14 gullmerkjum. Pauli Mohr úr Fuglafjarðar Svimjifelag setti harumframt fýra bólkamet**

SVIMJING

*Stefan í Skorini*

SUM er kappingin fyri bólk 2, sum eru svimjarar føddir í 1991 og 92, og fyri bólk 1, sum eru svimjarar føddir í 1993 og seinni. 80 svimjarar vóru í svimjihøllini í Vági, har kappingin var hildin.

Endaliga úrslitið var, at svimjifelagið Skeggjar úr Gøtu fekk flest heiðursmerki. Skeggjar fekk 14 gullmerki, 1 silvurmerki og 2 bronsumerki. Fuglafjarðar Svimjifelag var á øðum plássi og Havnar Svimjifelag var á triðja plássi.

Mest vinnandi einstaklingarnir vóru Elspa Mørkøre frá Skeggjum við átta gullmerkjum og Pauli Mohr úr Fuglafjarðar Svimjifelag við sjey gullmerkjum.

Pauli Mohr setti harumframt heili fýra bólkamet í bólki 2. Hann setti met í 100 metrar frí við tíðini 1.12.3. Gamla metið á 1.12.7 átti Hanus Eysturdal frá Havnar Svimjifelag. Í 100 metur bringu er nýggja metið hjá Paula 1.41.2. Gamla metið hjá Sonny Dalheim úr Skeggjum var 1.41.6.

Í 100 metur bringusvimjing setti Pauli met við tíðini 0.33.1. Gamla metið, sum Per M. Venned eigur, er 0.33.5. Síðsta metið hjá Paula var í 100 metur rygg, og tað var á 1.25.6. Pól Jóhannes Justinussen eigur gamla metið á 1.27.6.

Tey luttakandi svimjifeløgini vóru Vágs Svimjifelag, Tvøroyrar Svimjifelag, Fuglafjarðar Svimjifelag, Havnar Svimjifelag, Skeggjar úr Gøtu og Flot av Toftum.

Vanliga er kappingin í Klaksvík, men vegna umbygging av høllini, mátti kappingin finna nýggj høli í Vági. Fyrstu kappingarnar vóru fríggjadagin 12. apríl, tá Ásgerð Stenberg setti kappingina.

34 kappingar vóru tilsamans, og svomið varð í øllum svimjigreinum.



*Pauli Mohr úr Fuglafjarðar Svimjifelag og Elspa Mørkøre úr Skeggjum vóru teir einstaklingarnir, ið vunnu flest heiðursmerki. Pauli setti harumframt fýra bólkamet*



*80 svimjarar úr øllum landinum vóru við í kappingini í Vági. Her fáa nakrar gentur heiðursmerki*

## Smáunglingameistaraskapið 2002

**100 metur frí gentur bólkur 2**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1. | Elspa Mørkøre | Skeggjar | 1.17.7 |
| 2. | Mona Simonsen | TS | 1.28.0 |
| 3. | Katharina Madsen | HS | 1.30.4 |

**100 metur frí dreingir bólkur 2**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1. | Pauli Mohr | F.S. | 1.12.3 |
| 2. | Pauli Norðfoss | HS | 1.19.4 |
| 3. | Jóan Símun Edmundson | Flot | 1.20.9 |

**50 metur bringa gentur bólkur 2**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1. | Elspa Mørkøre | Skeggjar | 0.46.0 |
| 2. | Fríða við Streym | HS | 0.46.8 |
| 3. | Malan Bærendsen | TS | 0.47.8 |

**50 metur bringa dreingir bólkur 2**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1. | Pauli Mohr | F.S. | 0.45.9 |
| 2. | Arnold Davidsen | Flot | 0.50.5 |
| 3. | Patur Mc Intosh | HS | 0.52.5 |

**50 metur bring gentur bólkur 1**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1. | Margunn Jacobsen | Skeggjar | 1.06.3 |
| 2. | Elisabeth Bærendsen | TS | 1.08.3 |
| 3. | Dagmar M. Vinther | HS | 1.13.3 |

**50 metur bringa dreingir bólkur 1**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1. | Arni Gregersen | Skeggjar | 1.01.1 |
| 2. | Benjamin Sikivat | TS | 1.04.7 |
| 3. | Christian Dan Sørensen | HS | 1.07.0 |

**4 ferðir 50 metrar frí gentur bólkur 2**

| | | |
|---|---|---|
| 1. | Havnar Svimjifelag 1 | 2.52.4 |
| 2. | Tvøroyrar Svimjifelag | 2.59.1 |
| 3. | Skeggjar | 3.00.9 |

**4 ferðir 50 metrar frí dreingir bólkur 2**

| | | |
|---|---|---|
| 1. | Flot | 2.32.0 |
| 2. | Havnar Svimjifelag | 2.51.1 |
| 3. | Fuglafjarðar Svimjifelag | 2.56.9 |

**100 metur firvald gentur bólkur 2**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1. | Elspa Mørkøre | Skeggjar | 1.38.9 |
| 2. | Mona Simonsen | TS | 1.56.1 |
| 3. | Aster Thorsen | VS | 2.02.1 |

**100 metur firvald dreingir bólkur 2**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1. | Pauli Norðfoss | HS | 1.51.2 |
| 2. | Jóan Símun Edmundson | Flot | 1.52.2 |

**100 metur blandað gentur bólkur 1**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1. | Elisabeth Bærendsen | TS | 2.16.7 |

**50 metur rygg gentur bólkur 2**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1. | Elspa Mørkøre | Skeggjar | 0.43.9 |
| 2. | Mona Simonsen | TS | 0.46.8 |
| 3. | Katharina Madsen | HS | 0.47.7 |

**50 metur rygg dreingir bólkur 2**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1. | Pauli Mohr | F.S. | 0.39.6 |
| 2. | Petur Mc Intosh | HS | 0.42.7 |
| 3. | Jóan Símun Edmundson | Flot | 0.43.9 |

**100 metur bringa gentur bólkur 2**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1. | Elspa Mørkøre | Skeggjar | 1.39.8 |
| 2. | Fríða við Streym | HS | 1.47.6 |
| 3. | Malan Bærendsen | TS | 1.48.2 |

**100 metur bringa dreingir bólkur 2**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1. | Pauli Mohr | F.S. | 1.41.2 |
| 2. | Arnold Davidsen | Flot | 1.53.1 |
| 3. | Petur Mc Intosh | HS | 1.54.2 |

**50 metur frí gentur bólkur 1**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1. | Margunn Jacobsen | Skeggjar | 0.49.0 |
| 2. | Elisabeth Bærendsen | TS | 0.51.2 |
| 3. | Gunvá Justinussen | Skeggjar | 0.52.8 |

**50 metur frí dreingir bólkur 1**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1. | Benjamin Sikivat | TS | 0.44.4 |
| 2. | Hallur Petursson | VS | 0.45.5 |
| 3. | Christian Dan Sørensen | HS | 0.45.7 |

**100 metur blandað gentur bólkur 2**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1. | Elspa Mørkøre | Skeggjar | 1.28.7 |
| 2. | Bjørg Seloy | HS | 1.40.4 |
| 3. | Katharina Madsen | HS | 1.42.3 |

**100 metur blandað dreingir bólkur 2**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1. | Pauli Mohr | F.S. | 1.29.3 |
| 2. | Petur McIntosh | HS | 1.36.8 |
| 3. | Høgni Miné Rasmussen | HS | 1.38.5 |

**4 ferðir 50 metrar frí gentur bólkur 1**

| | | |
|---|---|---|
| 1. | Skeggjar | 4.24.0 |
| 2. | Fuglafjarðar Svimjifelag | 6.11.3 |

**4 ferðir 50 metrar frí dreingir bólkur 1**

| | | |
|---|---|---|
| 1. | Havnar Svimjifelag | 3.43.7 |

**50 metur frí gentur bólkur 2**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1. | Elspa Mørkøre | Skeggjar | 0.35.6 |
| 2. | Bjørg Seloy | HS | 0.38.4 |
| 3. | Mona Simonsen | TS | 0.38.9 |

**50 metur frí dreingir bólkur 2**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1. | Pauli Mohr | F.S. | 0.33.1 |
| 2. | Jóan Símun Edmundson | Flot | 0.33.9 |
| 3. | Høgni Miné Rasmussen | HS | 0.35.9 |

**50 metur rygg gentur bólkur 1**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1. | Gunvá Justinussen | Skeggjar | 0.59.2 |
| 2. | Elisabeth Bærendsen | TS | 1.01.2 |
| 3. | Dagmar M. Vinther | HS | 1.03.3 |

**50 metur rygg dreingir bólkur 1**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1. | Hallur Petursson | VS | 0.55.3 |
| 2. | Sacho M. Bjartson | HS | 0.56.9 |
| 3. | Christian Dan Sørensen | HS | 0.57.1 |

**100 metur rygg gentur bólkur 2**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1. | Elspa Mørkøre | Skeggjar | 1.27.4 |
| 2. | Mona Simonsen | TS | 1.43.2 |
| 3. | Bjørg Seloy | HS | 1.45.0 |

**100 metur rygg dreingir bólkur 2**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1. | Pauli Mohr | F.S. | 1.25.6 |
| 2. | Petur Mc Intosh | HS | 1.33.6 |
| 3. | Høgni Miné Rasmussen | HS | 1.36.6 |

**50 metur firvald gentur bólkur 2**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1. | Katarina Madsen | HS | 0.44.6 |
| 2. | Elspa Mørkøre | Skeggjar | 0.44.7 |
| 3. | Mona Simonsen | TS | 0.52.5 |

**50 metur firvald dreingir bólkur 2**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1. | Høgni Miné Rasmussen | HS | 0.45.0 |
| 2. | Jóan Símun Edmundson | Flot | 0.46.6 |
| 3. | Pauli Norðfoss | HS | 0.47.3 |

**4 ferðir 50 metrar firvald dreingir bólkur 2**

| | | |
|---|---|---|
| 1. | Skeggjar | 3.19.3 |
| 2. | Tvøroyrar Svimjifelag | 3.24.7 |